# TÍÐINDI

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Peningurin, ið kemur inn í fiskikappingini, fer óskerdur til Dragan*

## Hvør fjøl á flot í Klaksvík leygardagin

**FISKIKAPPING**
*Tíðindaskriv*

Viðrar verður árliga fiskikappingin í Norðoyggjum leygardagin 8. september

Úr Norðoyggjum siga teir, at komandi vikuskifti verður ein hampiliga góð streymloysa, og tí hevur Stuðulsfelagið fyri skúlaskipið M/S DRAGIN avgjørt at skipa fyri tí árligu fiskikappingini, sum er fyri allar Norðoyggjar..

Í fjør var tað báturin "Hvítiklettur" við monnunum Erling og Marius Vilhelmsen, sum var bestir, og fingu teir steyp til ognar eins og ferðasteyp. Næstbestur bátur var "Fiskanes" við Mikkjal Pauli Lamhauge og Eiler Jørgensen, og triðbestur var "Svartiklettur" við Elmar Simonsen og Kennet Justesen.

Frá kl. 7.30 fáa allir bátar, sum fara av vágni í Klaksvík luttøkuskjøl umborð á "Draganum". Luttakarar á Borðoyavík og Árnafirði fáa eisini luttøkuskjal umborð á "Draganum", men í Hvannasundi og Norðdepli fæst luttøkuskjalið við Frostvirkið, og á Viðareiði fæst tað niðri á Eiðsvík. Luttøkugjaldið er 20 kr. pr. mann.

# Miss Týskland vitjar í Føroyum

**Daniela Risch, ið umboðaði Týskland í Miss World kappingini í 2005, verður gestabarrvørður í Maverick í Klaksvík og Eclipse í Havn komandi vikuskiftið**

*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroyar fær í vikuskiftnum vitjan av einu,m forkunnugum gesti, tá ein fyrrverandi Miss World luttakari stendur handan barrdiskin í Maverick í Klaksvík og Eclipse í Havn. Talan er um Danielu Risch, ið vann týska umfarið av Miss World-kappingini í 2005. Eins og fyrrverandi pornostjørnan Katja K gjørdi tað fyri nøkrum árum síðani, fer týska sprundið at royna seg sum gestabarrvørður. Samstundis verður høvið hjá vitjandi at fáa eitt lítið prát við Danielu, meðan hon skeinkir í glasið, skrivar byin.fo

Umframt at umboða Týskland í Miss World kappingini kann Daniela Risch reypa um heiðurin "Miss Hawaiian Tropic II" í Týsklandi í ár umframt, at hon vann heiðurin "Miss European Queen 2007".

Daniela Risch stendur handan barrina í Maverick fríggjakvøldið og í Eclipse leygarkvøldið. Meir fæst at vita og síggja á byin.fo , har tað er link til hennara myspace síðu.




*Forkunnug vitjan í Klaksvík og Havn komandi vikuskiftið. Daniela Risch, sum umboðaði Týskland í Miss World kappingini fyri tveimum árum síðani, kemur nú hendanvegin*

EITZEN GROUP
Est. 1883

*EMS Ship Management (Denmark) A/S is part of the Oslo stock listed company Eitzen Maritime Services ASA, EMS, which currently delivers technical services of 118 ships within the product and chemical tank, gas, bulk, OBO and FPSO. The ships are managed from offices in Denmark, India, Singapore, Spain and Great Britain.*

**EMS Ship Management (Denmark) A/S**
*"Through dedication and innovation we will make a difference"*

**Superintendent for Gas carriers**

We are looking for a Superintendent for the technical management of gas carriers.

We manage 35 gas ships for the Eitzen Gas and ENGC pools, where a newbuilding programme has been commenced in order to replace elder tonnage and as part of expansion plans.

**Personal qualifications**
There are a number of entry points for this exciting position, e.g.:
- You are an officer with experience from gas ships.
- You are land based and have experience with installation and service of gas plants on ships.
- You are an superintendent with experience from the management of gas ships, or
- You are an superintendent with management experience from other types of ships.

We work in an international environment with colleagues from many different countries.
It is therefore important that you have a good understanding for cultural differences. Our Group language is English and it is therefore important that you speak and write English.
Your working day will be busy, but you will experience good teamwork and humour.

You will be responsible for the daily management of four to five ships.

**We offer**
A challenging and international position based in Gentofte, North of Copenhagen. Good development opportunities in a company which is in constant growth and restructuring. A training and tuition programme will be arranged based on your qualifications.

Eitzen Group is in constant development and to accommodate our many employees, we will be moving to newly built offices on Amerika Plads in Copenhagen during the Spring 2008.

To learn more about this position, please contact:
Marine Personnel Manager Runi Egholm on tel. +45 7733 8450 or Mob. +45 3038 1115
Vice President Jeppe Guld on tel. +45 7733 8417 or Mob. +45 2937 1760

Your applications should be sent to: job@eitzen-group.com under subject "Superintendent" before 7th September 2007.

**EMS Ship Management (Denmark) A/S**
Smakkedalen 8, DK-2820 Gentofte, Denmark
www.ems-shipmanagement.com Tel.: (+45) 7733 8400

www.sosialurin.fo Leyst starv á Sosialinum




**Ítróttaskrivari**

**Hevur ítróttur tín áhuga? og dugir tú at skriva? so ert tú kanska júst persónurin, sum vit sóknast eftir.**

**Til ítróttaredaktión okkara søkja vit eftir ítróttarskrivara. Høvuðsuppgávan verður saman við ítróttaredaktørinum at røkja eitt av kjarnuøkjunum hjá Sosialinum. Sum miðil hevur Sosialurin í nógv ár havt eina oddastøðu innan føroyskan ítrótt. Bæði á pappíri og alneti. Og verður tað eisini tín uppgáva at halda fast um og menna hesa oddastøðu.**

**Ljóðar hetta sum nakað fyri teg, so er bert at senda eina umsókn við frágreiðing um útbúgving, royndir og førleikar annars til okkum. Ynskir tú at fáa meira at vita um starvið, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Jákup Mørk á tlf. 341840 ella Jan Müller á tlf. 341831. Sjálvandi ber eisini til at senda teldupost til jakup@sosialurin.fo ella jan@sosialurin.fo**

**Umsóknarfreistin til starvið er fríggjadagin 14. september, og verður starvið sett sum skjótast eftir hetta. Umsóknin saman við viðkomandi skjølum skal sendast til:**

**Sosialurin**
**Jan Müller**
**Postsmoga 76**
**110 Tórshavn**

*Vit eru alla tíðina úti um okkum, og fimm ferðir um vikuna koma vit á gøtuna við einum nýggjum og feskum blaði. Umframt tað verður blaðið hvønn dag lagt á internetið. Á Sosialinum starvast í dag uml. 25 fólk.*